

Stóri dysturin er í Runavík, har HB kemur á vitjan. Er NSÍ komið víðari frá at vera eitt lið, sum bara vinnur á teimum lægru liðunum?

MYND: ÁLVUR HARALDSEN

Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	NSÍ	5	4	0	1	17	8	+9	12
2	B36	5	3	2	0	11	5	+6	11
3	HB	5	2	3	0	9	5	+4	9
4	Víkingur	5	1	4	0	12	8	+4	7
5	TB	5	1	3	1	7	6	+1	6
6	KÍ	5	1	2	2	7	7	0	5
7	AB	5	0	5	0	4	4	0	5
8	ÍF	5	0	4	1	7	9	-2	4
9	EB/Streymur	5	0	3	2	6	12	-6	3
10	FC Suðuroy	5	0	0	5	3	19	-16	0

Liðini hittust farna mánadag í steypakappingin. Tá vann B36 2-1 við málum, sum Lukasz Cieslewicz skoraði. Hann sat uttanfyri við leikbann í tríggjar dytir, eftir at hann bleiv útvístur í fyrsta umfari. Til hendan dystin er Hanus Thorleifsson leikbannaður, meðan Jónas Tór Næs og Alex Mellemgaard framvegis eru skaddir.

Fyri TB er talan um ein ókeypis møguleika at leggja afturat góðu byrjanini. TB hevur longu fingið stig í Gundadali fyrr, so hví ikki eina ferð afturat?

NSÍ – HB

Sunnudagin klokkan 15

DÓMARI: PETUR REINERT

Hetta er stóri dysturin hetta vikuskiftið. NSÍ er oddaliðið í deildini, meðan HB á triðja plássi er ein av trimum avbjóðarum til FM heitið. Hetta er ein dysturin, sum kann koma at svara upp á tveir spurningar:

Er NSÍ komið víðari frá at vera eitt lið, sum bara vinnur á teimum lægru liðunum? Er HB veruliga ein FM avbjóðari í ár?

NSÍ er eftirhondini tiltikið fyri bara at vinna á uppflytarunum og hinum botnliðunum. Í fjør rakk tað til eitt fjórða pláss og Europa League luttøku. NSÍ hevur aftur í ár gjørt tað sama. Vunnið á FC Suðuroy, TB, EB/Streymi og ÍF, men tapti greitt fyri B36. Á heimavølli móti einum HB liði, sum ikki spælir upp til sín besta, er ein gyltur møguleiki at venda skútini móti sterkastu liðunum. Stóri spurningurin hjá NSÍ er, um Árni Frederiksberg spælir við fullari ferð. Hann hevur havt trupulleikar í lærinum.

HB er ikki komið upp í snúningar enn. Eftir javnleikir á heimavølli móti AB og TB, so bragdaði móti EB/Streymi, men tó ikki uttan ávaringar, tí gestirnir skoraðu tvey mál.

At HB ikki er komið upp í snúningar sást greitt í steypadystinum móti Skála, har HB spældi sum eitt lið, ið ikki tímdi at vera á vøllinum. Fleiri lyklaspælarar eru ivasamir ella hava havt ivasaman uppstart. Her kunnu nevnast Christian R. Mouritsen (skaði), Símun Samuelsen (skaði) og Fróði Benjaminsen (útbúgving).

Hinvegin, so veist tú við HB, at tað er eitt felag, sum altíð avrikar tá á stendur. Hóast HB ikki hevur spælt flótandi fótbólt, so hevur liðið fimm núverandi landsliðsspælarar, einar fimm fyrrverandi landsliðsspælarar og U21 landsliðsáleyparan.

Tú kanst argumentera fyri sigri til bæði liðini í hesum dystinum. Spælir Árni Frederiksberg við fullari ferð og finnur Klæmint A. olsen við innleggunum, so fær NSÍ mál. Spælir HB hinvegin væl og fær álopsspælið at rigga, so er torført at ímynda sær annað ein HB sigur.

ÍF – KÍ

Sunnudagin klokkan 15

DÓMARI: ALEX TROLEIS

Bæði ÍF og KÍ hava lagt nógv fyri til hetta kappingarárið. Nýggir venjarar og fleiri nýggir spælarar. Tó hava úrslitini ikki fylgt við nú liðini hittast í Fløtugerði. ÍF hevur framvegis ikki vunnið Effo-deildini í ár, meðan einasti sigurin er komin í steypakappingini móti B71.

Alexandar Jocevic hevur boðað frá broytingum til hetta kappingarárið, men enn tykist hann leita eftir eini uppstilling, ið riggar. Tað verður flutt runt á fleiri plássum í løtuni. ÍF er hesa ferð uttan Ara Ó. Ellingsgaard, sum er burturstaddur. Hann hevur verið ein lyklaspælari í framrættaða spælinum. Somuleiðis er Adeshina Lawal ivasamur.

Fyri KÍ hevur talan verið um eina undir miðal byrjan uppá landskappingina, men her hoyrir til, at teir hava spælt móti trimum teimum ovastu frá í fjør, B36, HB og Víkingi. Størri trýst er komið á KÍ, eftir at teir heldur óvæntað taptu fyri EB/Streymi í 1/8 finaluni í steypakappingini. KÍ hevur lagt nógv fyri í ár og ætlar sær í Evropa. Nú er bara ein møguleiki, og tað er umvegis landskappingina.

KÍ hevur onkrar smátrupulleikar at dragast við, men allir mans eru meldaðir tøkir. Lærkrikin hevur argað Atla Danislen í eina tíð, meðan Evrard Ble enn ikki megnar at spæla fullan dyst.

Verður ein vinnari funnin í hesum dystinum, so kemur tapandi liðið helst undir eitt lítið trýst longu aftaná seks umfør.

EB/STREYMUR – VÍKINGUR

Sunnudagin klokkan 16

DÓMARI: PÁLL AUGUSTINUSSEN

Í fleiri ár vóru hetta liðini, sum stríddust um steypagullið. Fyrst var EB/Streymur stóra steypaliðið, men blivu yvirhálaðir av nú trífaldu steypavinnarunum úr Víkingi.

Til dystin í morgin er ongin ivi um, at Vikingur er favorittur. Teir ljósabláu úr eysturkommunu fingu hol á í heimadystinum móti FC Suðuroy. Undan sigrinum hevði Víkingur bara spælt javnleikir.

EB/Streymur hevur fingið trý stig fyri fimm tey fyrstu umførini. Ónøgd er í sundalagnum um, at tað ikki hevur eydnast at vinna onkran av dystunum, men bara tvey tap í fimm teimum fyrstu umførinum er góðkent.

Verður hugt eftir tølunum, so er ein javnleikur eitt gott boð. Liðini hava spælt tíggju dystir til samans, og av teimum eru sjey endaðir uttan vinnara.

Fyri Víking kemur tað væl við, at Finnur Justinussen er komin í gongd við málskjótingini. Hann hevur skotið sjey mál í tveimum teimum seinastu dystunum fyri Víking. Fýra móti FC Suðuroy í landskappingini, og trý móti B68 í steypakappingini. EB/Streymur hevur ikki tap á heimavølli í ár, so nógv bendir á ein javnan og spennandi dyst.

Víkingur er favorittur, men tað gongur ikki altíð, sum prestur prædikar.

TRONDUR@SOSIALURIN.FO

KÍ

Allir mans tøkir

ÍF

Ikki við: Jan Ellingsgaard (Burturstaddur),
Ari Ellingsgaard (Burturstaddur)
Ivasamir:
Fritleif í Lambanum (Fóturin),
Bartal Eliasen (Lærskaði),
Adeshina Lawal (Lærskaði)

AB

Ikki við: Teitur Jóannesarson (knæið, ivasamt),
Kári Nielsen (knæið, ivasamt),
Gert Drangastein (brotið fótin, 6 vikur),
Hørður M. Mohr (burturstaddur),
Rói Danislen (burturstaddur)
Ivasamur: Rógvi Poulsen (beklaði móti 07 Vestur)

TB

Allir mans tøkir

FC SUÐUROY

Ikki við: Salmundur Bech (brot í fótinum, 2 vikur),
Jón Áki Jacobsen (meniskur, undir skurð í vikuni)
Jón Krosslá Poulsen (leikbann)